# Rætt og slætt fólkaræði

*Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins*

Grundlóg Føroya skal staðfesta, at Føroya fólk hevur evsta valdið í Føroyum, áseta, hvussu vit skipa veruligt fólkaræði við somu rættindum og skyldum, og treytir fyri tí valdinum hjá umboðum okkum – bæði her heima og í altjóða samfelagnum.

*ein óskrivað søga,*
*ein orðaleys røða,*
*um fólkið her livdi, skapaði tjóð.*
(Christian Matras).

Tað er hesa óskrivaðu søgu, hesa orðaleysu røðu, um fólkið her livir og skapar tjóð – sum grundlógararbeiðið snýr seg um. At skriva tað óskrivaða – at orða tað orðaleysa – um okkara virðir, rættindi og skyldur. Sum tjóð, sum einstaklingar og sum heimsborgarar.

Við okkara egnu grundlóg skal fólkið fáa rødd, taka støðu til grundleggjandi virðini í okkara samfelag, lógirnar, rættin og valdið. Tað snýr seg sostatt rætt og slætt um fólkaræði. Veruligt fólkaræði, sum ongantíð hevur verið sett í verk í Føroyum.

Fólkið skal seta mørkini fyri politiska valdið – ikki øvut!

Føroya fólk er bert einaferð spurt um okkara politisku rættindi sum fólk og okkara stjórnarskipan – júst fyri 60 árum síðani. Tá segði fólkið nei til eina heimastýrisskipan og valdi, at vit sjálvsagt hava somu rættindi sum aðrar tjóðir í heiminum. Men fólkaræðið varð ikki sett í verk. Politisku flokkarnir og danskir myndugleikar gjørdu ístaðin av, at vit skuldu virka eftir heimastýrisskipan, sum fólkið júst hevði vrakað og grundlóg, sum vit ikki sjálvi hava valt.

Higartil hava politisku flokkarnir sett mørk fyri og skert valdið hjá fólkinum. Við at samtykkja egna grundlóg skal fólkið seta mørk fyri valdinum hjá politisku flokkunum og myndugleikunum.

Tað er ótrúligur framíhjárættur hjá okkum at skipa samfelagið í eitt veruligt fólkaræði. Vit hava allar møguleikar at skipa okkum í nútímans samfelag og sum javnbjóðis part í heimssamfelagnum.

Okkara serfrøðingar og framherjar í grundlógararbeiðinum hava higartil gjørt eitt framúr arbeiði – og hava lýst tættir, hugsanir, virðir og gjørt uppskot. Eg mæli øllum til at lesa tær frálíku greinir í álitunum frá grundlógarnevndini. Her eru viðgjørt um rættin til tilfeingið, og hvussu vit rættvíst umsita tað; føroyska rættarskipan; persónlig rættindi, javnstøðu, rættin til útbúgving og arbeiði; og fólkaatkvøður um týðandi mál.

**Fólkaræði er nógv meira enn partapolitikkur**

Men onki av hesum fær veruligan týdning, um fólk ikki sleppa at viðgera hesar spurningar og taka støðu. Uppskotið at skipa fólkavalt grundlógarráð at halda "várting" kring landið, har øll kundu vera við, fall tíverri á tingi.

Vit eiga støðugt at leggja dentin á, at grundlógararbeiðið ikki gerst nýtt partapolitiskt parkeringspláss, har aftur politisku flokkarnir sita og tosa um sítt egna vald og býta tað sínamillum. Vit kunnu neyvan gerast ósamd um, at Føroya fólk skal hava evsta vald í Føroyum, og at ongin politiskur flokkur ella myndugleiki kann leggja avgerðarrættin burtur frá føroyska fólkinum, um ikki fólkið hevur góðkent tað. Tí er grundlógararbeiðið gylt høvi at gera upp við alt tað, sum higartil er hent í føroyskum stjórnmálum í beinleiðis andsøgn til veruligt fólkaræði.



*Frá Trapputinginum í Miðlahúsinum mánakvøldið.*
*F.v. Jóannes Hansen, orðstýrari, Kári á Rógvi, Kaj Leo Johannesen, formaður Sambandsfloksins, og Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins*

*Mynd: Jan Müller*

# Stjórnarskipanarlógin

*Kaj Leo Johannesen, formaður Sambandsfloksins*

Royndirnar frá valskeiðinum 1998-2002 hava víst, at tað er neyðugt við breiðum meiriluta á Løgtingi, um vit vilja broyta týðandi politisk mál, og at tað somuleiðis er neyðugt at hava fólkið við.

Eitt stórmál sum hevði stóran týdning fyri Fullveldissamgonguna var setanin av grundlógarnevnd, sum hevði til uppgávu at gera eina nýggja grundlóg fyri Føroyar, í sambandi við at Føroyar skuldu skipast sum fullveldi. Ella sagt á annan hátt: At fáa føroyingum evsta vald, hvat tað so merkir í dagsins samfelag.

**Húsabygging**

Vanliga verður sagt um sethúsabygging, at tá bygt verður aðru ferð, er innrættingin best. So vit kunnu siga at Sambandsflokkurin sær Stýrisskipanarlógina frá 1994 sum tað fyrstu innrættingina í nýggjari tíð, og at vit við Nýggju Stjórnarskipanarlógini skulu umvæla, og endurnýggja húsini frá 94. Og sjálvandi, sum eitt tað týdningarmesta fyri Sambandsflokkin, skulu verða ásetingar um greiðar mannagongdir fyri, hvussu føroyingar kunnu gera brúk av okkara "sjálvsavgerðarrætti sambært altjóðarætti". Tað skal hvørki verða lættari ella torførari at gera broytingar í stjórnarskipanarlógini, enn tað var at seta hana í gildi.

Men tað sum Sambandsflokkurin sjálvandi framvegis hevur ringt við at skilja, er at fullveldissamgongan sum hevði meiriluta flokspolitiskt, ikki vísti seg at hava meiriluta í tingmannatali, tá herjast skuldi á múrarnar í ríkisfelagsskapinum. Men tað undarliga hendi, at sambandshugsjónin ella tjóðskaparhugsjónin innanfyri samgonguna, steðgaði fullveldisstríðnum og punkteraði fullveldisætlanina. Hetta vísti bert enn einaferð, at vit hava skyldu at fáa eina breiða semju, tá talan er um okkara framtíðarstøðu.

**Nýggja grundlóg**

Sambandsflokkurin vildi ikki taka undir við at gera nýggja grundlóg, tí vit hava longu eina grundlóg. Men tá so Løgtingi við meiriluta hevði samtykt at seta grundlógarnevnd, so kundi og vildi flokkurin ikki mótmæla einari demokratiskari tilgongd.

**Tekur støði í fólksins vilja**

Arbeiðið í grundlógarnevndini skal skipast av nýggjum. Uppgávan er at gera eina stjórnarskipanarlóg, sum eisini inniheldur ásetingar um mannarættindi og onnur rættindi. Umframt at lýsa verandi ríkisrættarligu støðu, skal lógin innihalda greiðar mannagongdir fyri, hvussu farast skal fram, um ríkisrættarliga støðan verður broytt.

Tann nýggja stjórnarskipanin, sum vit politikarar saman við serfrøðingum sita og arbeiða við, tekur støði í fólksins vilja og ikki viljanum hjá flokkunum. Vit mugu ongantíð sum politikarar ræðast at lata fólkið tala.